# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
eirikur@sosialurin.fo



# SUDURLYNDI SUM AÐALMÁL

Ein reiðari segði nú um dagarnar, at tað sum nú hendir í stríðnum millum manningarfeløgini og Føroya Reiðarafelag er ímyndin av føroyska samfelagnum: Einki skil er í nøkrum, alt snýr seg bara um vald og mammon.

Og rætt hevur hann. Reiðarafelagið er eitt gott dømi um tað, at menn sum eru eina frægast fyri, fella fyri freistingini at bróta samanhaldið, sum eigur at vera – bæði millum reiðarar og millum manningarfeløg. Bæði fakfelagsstríð og arbeiðsgevarastríð snýr seg um at standa saman. Fakfeløgini og tess limir skulu standa saman og virða vunnin rættindi og halda fast um og virða tey. Tað sama má arbeiðsgevarin gera. Annars ber einki til, og so verður alt tað reina anarki. Her er so gloppið hjá Viberg Sørensen og hansara monnum, tí aðrir hava givið teimum knívin í ryggin.

Og manningarfeløgini eru ikki smettin frægari. Tað er ein álvarsom vandakós at koyra grús í maskinuna hjá mótpartinum á henda hátt. Nú ber til at seta fólk upp ímóti hvør øðrum - og endin kann vera, at manningarfeløgini standa veikari.

Í fjør blottaði Føroya Fiskimannafelag seg við óvirðiligari framferð ímóti einum starvsfólki. Her tók formaðurin okkurt persónligt stríð fram um felagið og fram um tað mest grundleggjandi hjá einum fakfelag - at virða grundleggjandi fakfelagsrættindi. Hini feløgini í Samtaki stuðlaði hesi sera margháttligu framferðini hjá einum fakfelag, og hóast maðurin, alt snúði seg um er deyður, so er eingin almenn umbering komin frá teimum enn. Tað er lítið sømiligt og vísir, at persónlig maktgirnd skuggar fyri aðalendamálinum, at virða vunnin rættindi.

Vit kunnu halda fram í politikkinum. Løgmaður ger einki, hóast Fólkaflokkurin tekur løgmann av ræði og umskipar landsstýrið eftir egnum høvdi. Men nei, tað fær ongar avleiðingar.

Og Javnaðarflokkurin hevur stórar innanhýsistrupulleikar av



tingmanni, sum ikki møtir til fundir. Men flokkurin ger einki. Í síðstu viku speirak hann listarfólk og segði, at mentanarlønirnar til listarfólk áttu at verið avtiknar. Eingin í flokkinum mótmælir. Hóast tey tiga, so vita vit, at tey ikki taka undir við honum, men tey siga einki.

Jú tað snýr seg um vald. Og jú tað snýr seg um pengar. Men onkur má fór ólukkan siga: »Her til og ikki longur«. Men persónlig áhugamál verða tikin fram, og tí er tað sundurlyndi heldur enn samanhald sum verður sett í hásæti – og tað køvir alt samfelagið.

**Ein og hvør er sær sjálvum næstur, ið hvussu tað øðrum gongur**

---

## Føroyskt avantgarde

Seint í gjárkvøldið var stóra mótashowið hjá Barbaru í Gongini á Copenhagen Fashion Week.

Barbara hevði ta seinastu sýningina á donsku mótavikuni - kanska tí danir vilja goyma tað besta til seinast.

Í fjør fekk Barbara framúr góð ummæli fyri sína sýning, og vit vildu fegin kunnað sagt tykkum hvørja móttøku sýningin fekk í ár, men tá blaðið fór til prentingar, var enn einki at frætta úr danska høvuðsstaðnum.

Í øllum førum kunnu vit staðfesta, at Barbara var trúgv móti sínum avantgardekendan stíli. Les stóra samrøðu við Barbaru í Vikuskiftinum.

Hendan myndin er frá sýningini í gjárkvøldið.



*Mynd: copenhagenfashionweek*

## Vilja ikki skerja seg sjálvi

Hóast hundurin enn ikki er hálvbardur, er longu nú greitt, at lítil og ongin undirtøka er í Løgtinginum fyri uppskotinum hjá Magna Laksáfoss, Sjúrði Skaale og Birni Kalsø um at skerja tingmannatalið úr 33, sum tað er nú, niður í 25.

Løgtingið hevur viðgjørt uppskotið einaferð, so enn er viðgerðin bara komin í eygað, tí nú er tað fyrst farið í nevnd og so skal tað viðgerðast einaferð afturat.

Men tað átti ikki nógvar vinir í Løgtinginum, tvørtur ímóti heglaðu flestu tinglimir bæði uppskot og uppskotstillarar ígjøgnum.

Tey róptu seg upp á, at verður tingmannatalið skert, máar tað støðið undan fólkaræðinum, tí Løgtingið skal umboða ymisk sjónarmið og tess færri tinglimir eru, tess færri sjónarmið sleppa upp í part.

Og uppskotsstillararnir sjálvir vórðu kallaðir óloyalir ímóti samgonguni, tí teir høvdu lagt uppskotið fram í sjálvdrátti, hóast teir sita í eini samgongu. Men hvat verri er, hava teir lagt hetta uppskotið fram, samstundis sum ein nevnd situr og arbeiðir við at endurskoða vallógina.

Afturímóti vístu uppskotsstillararnir á, at almenni raksturin var skerdur allastaðni og Løgtingið eigur eisini at taka sín part. Men teir hildu, at tað er merkisvert, hvussu stórur mótvilji, Løgtingið hevur ímóti at skerja hjá sær sjálvum, tí tað eru altíð onkrar undanførslur, hvøjar ferð, tann møguleikin verður nevndur.



**So leyp Gerhard aftur á listafólkini**

ODDFRÍÐUR M. RASMUSSEN
KJAK Á SÍÐU 19



**Blandar fakligheit og politikk**

ROLF GUTTESEN
KJAK Á SÍÐU 19

## Helena sett fjølmiðlakommisjón

Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í mentamálum, hevur mannað fjølmiðlakommissjónina, sum skal viðgera støðuna í føroyska miðlaheiminum.

Hetta er gjørt í kjalarvørrinum av public service sáttmálanum, sum er gjørdur millum Mentamálaráðið og Kringvarpið.

Landsstýriskvinnan hevur havt fund við privatu miðlarnar, og hon ynskir, at kannað verður, hvørji tiltøk kunnu bøta um støðuna á fjølmiðlamarknaðinum, so tryggjað verður, at vit hava eitt breitt útboð av fjølmiðlatænastum til gagns fyri land og fólk.

Fjølmiðlakommissjónin skal viðgera spurningar sum t. d. um kringvarpsbygnaðurin skal vera sum hann er, ella eru aðrir møguleikar, skal Kringvarpið t.d. umskipast til eitt alment partafelag e.l.? Hvussu kann Kringvarpið fíggjast í framtíðini, samstundis sum vit á bestan hátt tryggja, at eitt úrval av privatum fjølmiðlum (bløð, portalar og sendistøðir) kunnu virka og halda ásetingar um góðan fjølmiðlasið?

Hesi manna fjølmiðlakommissjónina:

*Martin Næs, deildarstjóri, formaður, Høgni Reistrup, cand. mag., skrivari, Katrin D. Apol, cand. mag, Enna G. Mikkelsen, cand. mag., tíðindakvinna, Sigmund Poulsen, advokatur, Ina Hyttel Hammershaimb, cand. oecon., Alda Joensen, fulltrúi, samskipari.*

Landsstýriskvinnan ynskir at fáa eitt álit við tilmæli um, hvussu víðari skal farast fram, tá ið tað snýr seg um føroyskan fjølmiðlapolitikk. Eitt álit, sum kann leggjast fyri politiska myndugleikan til nærri viðgerðar. Fjølmiðlakommissjónin skal skipa fyri, at avvarðandi fyritøkur, stovnar og feløg, ið onkursvegna varða av ella arbeiða í miðlaheiminum, verða hoyrd og fáa møguleikar at føra síni sjónarmið fram fyri fjølmiðlakommissjónina.

Ætlanin er, at fjølmiðlakommissjónin skal verða liðug við sítt arbeiði á ólavsøku í 2011.

**Sosialurin** Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*